# Kjak



Palli Dalsgaard

## Ótakksamt arbeiði

*Tað man altíð hava verið ótakksamt at vera fíggjarmálaráðharri, men so ótakksamt sum hetta tørnið man neyvan hava verið.*

Jóannes Eidesgaard hevur higartil klárað at hildið tørn. Tað er gott gjørt. Onkuntíð hevur man hoyrt hann sagt, at tað eru samstarvsfelagar, ið ikki skilja støðuna og tað er tíverri so. Tað, sum umrøður, sum støðan er, er at bjarga okkara lítla landi undan húsagangi, og fyri at tað kann lata seg gera, mugu vit øll vera við til at hjálpa til. Men tað vísir seg ikki. Tað eru alt fleiri og sær at kunna gera fyrr enn nøkur ár eru gingin.

Høvuðsuppgávan hjá núverandi stýri má vera at fáa skútuna aftur á rættkjøl, og fyrr enn tað er gjørt, kunnu vit ikki vænta nøkur stórarbeiði.

Tað hesir løgtingslimir gera við ikki at vera við, er illa umhugsað, teir svíkja sínar veljarar, tí hvørt mansbarn ynskir skipaðar umstøður aftur í okkara landi.

**_Áðrenn Skálafjarðartunnili er liðugur, kasta íleggjararnir frá sær, og so hongur løgtingið upp á skuldina._**

fleiri, ið koma á skíggjan og boða frá, at teir eru ikki við og fyri tað mesta eru orsøkirnar til tað, at teir hava ikki fingið tey ymisku arbeiðini við, ið hoyra til teirra økir. Tað eru arbeiði, sum eingin kann hugsa

At geva loyvi til Skálafjarðartunnilin verður sum løgtingskvinnan Bjørt Samuelsen sigur. Áðrenn arbeiðið er liðugt, kasta íleggjararnir frá sær, og so hongur løgtingið upp á skuldina.





Óli Mikkelsen
*lækni*

## Skálafjarðartunnilin

*Fyri páskir var Skálafjarðartunnilin til umrøðu. – Eg órógvaðist við, hvussu nógvir politikarar hálovaðu eini loysn, sum Landsverk hevur verið ímóti, serliga tí, »geniala« at trunka so nógva ferðslu, sum til ber, saman og í eina rundkoyring langt undir havbotninum, tá hetta ikki er neyðugt.*

Ferðslan tvørtur um Skálafjørðin eigur ikki at vevjast inn í ferðsluna millum Eysturoy og Suðurstreymoy.

Trupulleikin við tunli millum Strendur og Saltnes er at sleppa upp og niður og víðari frá tunnilsmunnanum.

Hanus Vang nevndi herfyri rørskipan eftir botninum. Hesin møguleiki eigur at kannast, tí her verður mangar ferðir lættari at sleppa upp og niður. Verður ferðslan millum Eysturoy og Streymoy sáldað frá, verður minni ampi av at vera í bygdum øki. Heldur ikki verður neyðugt við tveimum koyribreytum í tunlinum.



### Eysturoy – Streymoy

Eg havi áður víst á fyrimunir við at fara millum Sandvíkar (Hvítanes) og eystara enda á Toftavatni og taki tveir stórar fyrimunir fram:

**I.** Farið verður, har dýpið er minst, og tað gevur minni oljunýtslu, minni slit, minni luftdálking, bíligari pumpuskipan o.s.fr.

**II.** Munnarnir báðir vera í óbygdum lendi.

Vestari munnin er tætt við høvuðsveg, og lætt er at gera íbinding við rundkoyring.

Eystaru megin er frítt fyri og ein góð loysn, um lurtað verður eftir Hans Paula arkitekti í Runavík. Fyri nógvum árum síðan segði Hans Pauli: Høvuðsvegurin í Runavík verður av Lambareiði eftir hjallanum oman fyri húsini. – Hesin vegur má gerast sum skjótast, so hann ikki verður saboteraður av fleiri útstykkingum.

### Flogvøllur

Løgtingið hevur víst á, at vit eiga at hava alternativan flogvøll. Kanningar higartil vísa á Skorhædd. Har kann gerast long flogbreyt við tvørbreyt, og tvørbreytin í landnyrðing/útsynning kann lættliga gerast meira enn 1800 m long, tí har er lendið slætt. Verður arbeiðið samskipað við tunnilsgerð, verða nógvir pengar spardir.

### Arbeiðsloysi

Nú arbeiðsloysi hóttir meir og meir, skuldi verið rætt at farið undir skilagóðar verkætlanir.

### Pengar

Bankarnir eru sjálvandi varnir við at geva stór lán í hesum tíðum. Tí er umráðandi, at verkætlanin verður so væl skipað, at peningastovnarnir hava álit á henni, so lánitreytirnar verða so góðar sum til ber.

### P.S.
### Flogvøllur Skorhædd

Meðan eg skrivi endan av hesum stubba, koma boð frá Landsverki: Glyvursnes er best egnað til flogvøll.

Skorðhædd verður nú strikað vegna óhóskandi inn- og útflúgvingarviðurskifti.

Fyrr hevur turbolensur verið brúktur sum umbering at strika Skorhædd.

Í desember 2007 hevði Gilli Trónd framløgu av møguleikum til flogvøll á Glyvursnesi, Borðuni og Skorhædd, aftan á at fyritøkan hevði kannað flogvøllir úti í heimi, har umstøðurnar eins og í Føroyum onganstaðni eru lýtaleysar.

Einki varð funnið, sum gjørdi Skorhædd ónýtiliga.

– Um breytirnar venda rætt, eru fjøllini ikki nøkur forðing. Turbolensur heldur ikki, mett eftir royndunum frá vindmylluni. Nógv flestir fyrimunir eru við Skorhædd: Flogbreyt av Eystnesi kann verða einar 4 km long, og tvørbreyt kann vera meira enn 2000 m long. – Eingin tvørbreyt verður á Glyvursnesi og í Søltuvík. Flogvøllurin verður mitt í Føroyum og tætt við flestu ídnaðarøki, okkara bestu skipahavn o.s. fr.

Fyri mær at síggja, er tað púra ábyrgdarleyst ikki at taka Skorhædd við í endaligu kanningunum av turbolensi og øðrum. Tá tað kemur til cost bennefit – tað sum samfelagið fær fyri pengarnar – má Skorhædd vera nógv best fyri. Tvørbreytin um 2000 m long verður á sløttum lendi, kann tí gerast skjótt og bíliga, og verður arbeiðið samskipað við tunnilsgerð, helst nógv bíligari enn at leingja flogvøllin í Vágum til 1.799 metrar.

